

Almannastovan søkir
# Sosialráðgeva.

**Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.**

**Fyri at betra um tænastustøðið hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar. Høvuðsuppgávan hjá økisdeildunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taka avgerðir.**

**Á Eysturoyar deild í Runavík eru 6 starvsfólk og ein deildarleiðari.**

Á deildini hjá Almannastovuni í Runavík er eitt fulltíðarstarv sum sosialráðgevi leyst at søkja.

Tann, ið settur verður í starv, verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er, at tú ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávunar í samsvari við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar stovunurin hevur.
Starvið fevnir í høvuðsheitum um ráðgeving og vegleiðing av borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar, íverksetan av fyriskipanum, gerð av tilráðingum í sambandi við umsóknir um fyritíðarpensjónir og annað.

Vit sóknast eftir fólki við sosialráðgevaraútbúgving. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan almenna fyrisiting, góðan telduførleika á brúkarastøði, kunnleika til skrásetingararbeiði og góðan førleika í føroyskum.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 5.
Starvsøkið er Eysturoyar deild, og fevnir annars um øll øki hjá Almannastovuni.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Egil G. Olsen, deildarleiðara, á telefon 474710.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 2. desember 2005.

Send umsóknina til
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

KREA.FO · TEL 47 80 80

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo




Kánus er nú í handlunum!

Stuttligasta spurningaspælið, sum er komið á føroyskum.
Undirhald og spenningur við spurningum um alla ta vitan, sum goymir seg í okkara dagliga máli.

Statt ikki sum Kánus, men keyp spælið nú!
Kánus fæst í hesum handlum:

550,- kr.

Keypssamtøkurnar kring landið
Bókasølan og Griffilin í SMS
BR Leikur
Thomas Dam á Hálsi
H. N. Jacobsens Bókhandil
Hjalmar Jacobsens Bókhandil

Leikalund, Klaksvík
Alfa Bókhandli, Klaksvík
Leikabúðin, Saltangará
Fa. Ellen Dahl, Vágur
Karl Jespersen, Tvøroyri

SISERO 351800

ATLANTIC AIRWAYS · www.fk.fo · REYNI SERVICE · SKIPAFELAGID



# KAJ2

**EITT KRÍGGI ER MILLUM HESAR BÁÐAR MYNDIRNAR**
av skiparanum Kaj, og tað er hetta kríggj, seinni heimsbardagi, annað bindið í ævisøguni um Kaj snýr seg. Seinni heimsbardagi var eisini ein gulltíð fyri teir sum sluppu at sigla. Hvussu nógv fortjentu teir? Eitt yvirlit er aftast í bókini yvir inntøkurnar hjá hvørjum einstøkum manni, sum sigldi hjá Kjølbro, enntá túr fyri túr undir krígnum.

*Bíleggjast kann eisini beinleiðis gjøgnum heimasíðuna www.hellurnar.com.*

FØROYAPRENT · TEL. 314 555

## Bíleggingarseðil
Undirritaði ynskir at fáa annað bindið, **“Kaj – ein dokumentarisk ævisøga”** sendandi við postinum útgávudagin, sum verður seinnu helvt av oktober. Bókin er 440 síður og kostar 399,- kr. í sølubúðunum. Til ber at keypa bæði bindini gjøgnum hendan bíleggingarseðil beinleiðis frá lagnum fyri 349 krónur hvørt, tá er postgjald íroknað.



Verður sent ópostað (móttakarin rindar postgjaldið)

330

Eg bíleggi: ☐ **KAJ** ______ stk. (*fyrsta bind*) ☐ **KAJ2** ______ stk. (*annað bind*)

Navn:

Bústaður:

Postnummar:

Bygd/býur:

*Undirskrift*

**Forlagið Hellurnar**
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard
Ovaragøta 1, 188 Hoyvík.
Tel. 322800 ella 223143
Teldupostur: justinus@post.olivant.fo
www.hellurnar.com